Tinghúsið er enn ikki heilt liðugt, hóast tað upprunaliga skuldi standa klárt til ólavsøku í fjør. Kostnaðurin av umvælingunum er tvífaldaður, men ein orsøk til tað er, at nógv ikki var íroknað frá byrjanini, sigur Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni

Tinghúsið ikki liðugt til ólavsøku

Upprunaliga var ætlanin, at nýggja løgtingshúsið skuldi standa klárt til ólavsøku í fjør, men arbeiðið hevur verið nógv seinkað, og tað verður heldur ikki heilt liðugt til setanina í ár. Av ymiskum orsøkum eru umvælingarnar vorðnar tvífalt so kostnaðarmiklar sum ætlað

LØGTINGSHÚSIÐ
Marjun Dalsgaard

Umstøðurnar at byggja nýggju løgtingshúsini hava ikki verið av teimum bestu. Arbeiðsgongdin hevur verið nógv tarnað, millum annað av at tað hevur verið trupult at sleppa framat byggiplássinum í miðbýnum í Havn.

Upprunaliga var ætlanin, at nýumvældu hølini hjá landsins kosnu myndugleikum skuldu standa klár til setanina á ólavsøku.

Arbeiði er tó væl fráliðið, sigur Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni, og eingin trupulleiki verður hjá ólavsøkugestum at vitja hølini. Tað eru smáting sum mangla, sigur hon, til dømis WC niðriundir. Súsanna Danielsen væntar, at arbeiðið er heilt liðugt 15. september í ár.

Dupult so dýrt

Arkitekturin aftan fyri verkætlanina, Heidi Poulsen, dylir ikki fyri, at arbeiðið er vorðið munandi dýrari vegna trupulleikarnar, men vil ikki siga nakað um upphæddina.

- Tað vil eg helst ikki úttala meg um, so kemur politikkur upp í, sigur hon. Edmund Joensen løgtingsformaður veit ikki at siga, hvat upphæddin er komin upp á og vísir til Súsonnu Danielsen. Heldur ikki hon kann siga nakað um hvussu nógv tann longda tíðarætlanin hevur kostað, men samlaða upphæddin av umvælingunum er 47 milliónir móti umleið 20 milliónum, sum fyrst varð roknað við.

Súsanna Danielsen leggur tó dent á, at ikki alt varð íroknað í kostnaðin av fyrstan tíð, millum annað innbúgv og flyting av Føroya Tele.

Nógvir ymiskir trupulleikar hava verið í við arbeiðinum á Tinghúsvegnum, og umstøðurnar fórdu beinanvegin við sær, at arbeiðið varð seinkað tveir til tríggjar mánaðir.

Trupleikar arbeiðsgongdini

Ein av teimum fyrstu trupulleikunum við umvælingini av gomlu tinghúsunum og Telefonverkinum var, at býráðið sýtti fyri at stongja Tinghúsivegin fyri ferðslu. Millum annað av tí, at Tryggingin um sama mundi umvældið sín bygning á Kongabrúnni, og ferðslan í miðbýnum varð nógv órógvað. Handlarnir í miðbýnum vóru í øðini tí viðskiftafólk teirra sluppu ikki til miðbýnum við bili, og at stongja Tinghúsvegin eisini kundi ikki koma uppá tal. Tískil varð byggiplássið lagt millum Føroya Sparikassa og Telefonverkið, og fyri at Havnará ikki ótilskilað skuldi lata upp aftur, var nógv roks við kanningum, planlegging og byggiloyvi, og tað hevur verið ringt at sleppa framat við stórum, tungum bilum.

Haraftrat varð Føroya Tele, ið enn heldur til í hølunum á Tinghúsvegnum, sera órógvað av ganginum, tá umvælingin fór í gongd. Tólini, sum Føroya Tele brúkar, vóru nógv órógvaði av byggiarbeiðinum, og tí var av fyrstan tíð altíð neyðugt at bíða við at spreingja og bora, til klokkan var farin av fýra, og starvsfólkð á Føroya Tele var farið heim. Hetta er bara nakrir av trupulleikunum, sum stungu seg upp – tað er ógjørligt at nevna teir allar – tað hevur verið ein sera trupul mannagongd, sigur Heidi Poulsen um, hví verkætlanin er seinkað meir enn eitt ár.

Minn meg á heldur skil á

Trúgvi fylgisveinurin hjá skúlanæmingunum, ið vilja halda skil á, er aftur í ár at fáa kring landið til tey, ið vilja fyrireika seg til næsta skúlaár.

"Minn meg á" er ein bók til skúlaungdóm og umframt tann vanliga vikukalendarin hevur bóklingurin álmanakka, tímatalvur og frídagarnir í skúlaárinum skrivaðir upp. Í mun til í fjør er bókin økt í síðutali. Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið gevur bókina út, og hon fæst í sølubúðunum fyri 60 krónur.

MD

Fyrsta føroyska operan í gerð

Í samband við, at tónleikabólkurin, Aldubáran, fyllir 10 ár í 2005, verður fyrsta føroyska operan skrivað. Talan er spennandi verkætlan, sum bæði tónleikaskaldið, Sunleif Rasmussen, og sjónleikarar úr Grímu eru við í.

FØROYSK OPERA
Páll Holm Johannesen

Arbeiðið við at gera fyrstu føroysku operuna nakrantíð er farið av bakkastokki. Tað er føroyska tónaskaldið, Sunleif Rasmussen, sum stendur fyri verkætlanini.

Í samband við, at føroyski tónleikabólkurin, Aldubáran, hevur 10 ára á baki í 2005, hava tey heitt á Sunleif um at skriva eina operu til hátíðarhaldið. Uppgávan hjá Sunleifi er at skriva tónleikin, og afturat sær hevur hann fingið Dánial Hoydal, sum skal skriva tekstin til føroysku operuna.

Ein kamaropera

Føroyska operan verður ein sokallað kamaropera. Eyðkenni við einari kamaropera er, at uppsetingini er sum heild minni enn vanligar operur. Talan er ikki um fult symfoni orkestur, men heldur um einkultar bólkar. Kórini eru ei heldur so væl mannað, sum á vanligum operum.

Føroyska operan verður nakrar tímar til longdar, og tað er eisini styttri enn vanligar operur, so samanumtikið er talan um ein væl minni uppseting, enn til vanligar operur.

Hóskandi fer Aldurbáran saman øðrum gestum at spæla tónleikin hjá Sunleifi Rasmussen. Sjónleikin standa okkara fremstu sjónleikarar úr Grímu fyri. Tað verður Eyðun Johannesen skal leikastjórna.

Í samband við, at føroyski tónleikabólkurin, Aldubáran, fyllir 10 ár í 2005, hava tey heitt á Sunleif Rasmussen um at skriva tónleik til eina føroyska operu. Talan er um eina stóra verkætlan, har okkara fremstu sjónleikarar úr Grímu eisini verða við.
Mynd: Savnsmynd

Søga eftir William Heinesen

Søgan, sum verður brúkt í operuni, verður ein stuttsøga eftir William Heinesen. Talan er ikki um eitt av hansara mest lisnu verkum. Stuttsøgan hjá Williami eitur "Den gale mands have", og sambært Daniali Hoydal er stuttsøgan sera væl egnað til verkætlanina. Søgan snýr seg í stuttum um nøkur børn, sum royna at sníkja seg í ein loyniligan urtagarð, og á ferðini hendir nógv spennandi.

Í søguni trýtir ikki við myndaspæli, og í søguni er nógv ljóð, sum hóskar væl til operur. Myndaspælið er um sjálvt lívið, kynsbúning (pubertet) og átrúna, so tað er nokk at tríva í, greiðir Danial Hoydal frá.

Hann hevur til árslok at skriva tekstin, og í løtuni gongur væl við at halda freistina. Eftir, at teksturin til operuna er skrivaður, fer Sunleif Rasmussen undir at gera tónleikin. Alt árið 2004, og partur av 2005 er sett av til at gera tónleikin. Gríma fer síðani við ársbyrjan 2005 undir at venja operuna, og eftir ætlanin skal fyrsta føroyska operan sýnast fram á heysti 2005.

Inga Poulsen Dam:

Eingin trupulleiki við stutta skotbráðnum

Ólavsøkuprædikan í ár verður um tað søguliga, sigur Inga Dam Poulsen. Hon er fegin um at hava fingið uppgávuna at prædika á ólavsøku, og vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til rumblið hesa vikuna, nú ivi tók seg upp, hvør skuldi halda prædikuna

ÓLAVSØKUPRÆDIKA
Páll Holm Johannesen

Tað hevur ikki verið heilt frítt fyri rumbli hesi vikuna um ólavsøkuprædikuna. Ólavur Rasmussen var upprunaliga fremst í røðini at halda prædikuna, men hann bar seg undan í vikuni, og tí varð heitt á Ingu Poulsen Dam.

Vanliga veit prestur eitt ár frammanundan, at nú stendur hann fyri tørni at halda ólavsøkuprædikuna, men í ár hevur Inga Dam Poulsen fingið óvanliga stutt stotbráð. Hans Jacob Joensen, bispur, segði í Útvarpi Føroya hískvøldið, at hetta var fyrstu ferð, at ein prestur bar seg undan at halda ólavsøkuprædikuna, so støðan hjá Ingu Poulsen Dam er heilt serlig.

Eingin trupulleiki

Spurd, um tað nakar trupulleiki, at bert at hava nakrar fáar dagar at fyrireika seg til so stóra prædiku sum ólavsøkuprædikuna, svarar Inga, at sjálvandi hevði tað verið ynskiligt við meira tíð, men sum prestur er ein vanur við at hava stutt skotbráð, og tí er hon brynjað til at loysa slíka uppgávu. Hon sær tí ongan stórvegis trupulleika við stutta skotbráðnum.

Inga Poulsen Dam hevur verið eykamaður hjá Ólavi hetta árið til prædikuna, og hon vísir ikki aftur, at hon hevur gjørt sær nakrar tankar um prædikuna, um so var, at tað ikki lá fyri hjá Ólavi. Spurd, um støðan hesa vikuna ikki hevur verið nakað ógreið, svarar Inga, at hon kann ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið, og sigur bert, at hon tekur fegin uppgávuna á seg, nú tá ikki lá fyri hjá Ólavi Rasmussen.

Inga Poulsen Dam er fegin um at hava fingið uppgávuna at prædika á ólavsøku. Hóast tað hevði verið ynskiligt við meira tíð, so sær Inga ongan trupulleika í stutta skotbráðnum, hon hevur fingið til at fyrireika prædikuna
Mynd: Jens Kristian Vang

Prædika um tað søguliga

Presturin í Norðurstreymoyar Prestadømi sigur seg fara at leggja dent á tað søguliga við ólavsøkuni á prædikuni í ár. Hon heldur, tað er sera hugvekjandi við gamla ólavsøkusiðinum. Inga vísir okkum á, at arvurin við at seta tingið á ólavsøku er ávirkaður av kristna arvinum, og tískil er eitt sterkt samband millum politikk og kristnidóm í Føroyum.

– Áðrenn Føroyar vórðu kristnaðar var tingsetanin ikki á ólavsøku, men eftir, vit blivu kristnaðar, varð setanin flutt til á ólavsøku. Søguliga sambandið millum politikk og kristnidóm í Føroyum er tí avgjørt til staðar, greiðir Inga Poulsen Dam frá.

Spurd, um tað er nakað serligt at prædika á ólavsøku, svarar hon, at tað minnir nógv um vanligar prædikur, men at støðan er heilt serlig, tí ein skal tala til alla føroysku tjóðina.

– Av tí, tú helst bert einaferð sleppur at prædika á ólavsøku er støðan heilt serlig. Ein kann siga, at ein kemur at vera við eitt søguligt, mentanarligt og andaligt kelduvað, sigur Inga Poulsen Dam.

Seinastu mánaðirnar hevur nógv verið skrivað og hoyrt um, at búskaparliga støðan í Føroyum ikki er tann bjartasta. Tá vit spyrja Ingu um hon hevur ætlanir at siga nakað um búskaparligu støðuna, svarar hon, at teksturin (Matt. kap.16, blóm), er sera væl egnaður til almenn menniskjaslig evni, og tískil verður størstur dentur á lagdur á tað evnið í prædikuni.

Eitt sindur øðrvísi ólavsøka

Inga Poulsen Dam kemur at hava úr at gera næstu dagarnar. Hon skal prædika sunnudagin, og í løtuni fer mesta tíðin fer við at fyrireika ta prædikuna, og síðan verður hon noydd at savna tankarnar til prædikuna ólavsøkudag.

Maðurin Marjus Dam er løgtingsmaður, so hann verður eisini við í skrúðgonguni ólavsøkudag. Inga væntar, at ólavsøkan í ár verður eitt sindur øðrvísi enn undanfarin ár, tí bæði hava skyldur, sum tey skulu røkja.

Kortini ætla hon og maðurin at taka sær av løttum á ólavsøku. – Vit ætla okkum at ganga á gongugøtuni, tosa við fólk, vitja familju og fara á listaframsýningar, sigur Inga Poulsen Dam at enda.